Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
Tíðindaleiðari: Justinus Eidesgaard

Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen

Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Marknaðardeild: Jónhard Hammer

Dagbjørt S. Hansen, Hjørdís Árnadóttir
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Skattarokningin 400 mió. ov høg

Oddagrein

FÍGGJARLÓGIN næsta ár hevur aftur eitt yvirskot, sum fer at liggja um 500 milliónir krónur, um búskaparliga grundarlagið ikki fer at broytast munandi. Taka vit blokkin við, eru inntøkurnar tilsamans 3,5 milliardir. Við øðrum orðum er yvirskotið ein rættiliga stórur prosentpartur av inntøkunum og fíggjarlógini sum so.

HETTA fegnast Karsten Hansen sjálvandi um, men hann kom eisini at siga í eini sjónvarpssamrøðu – um tað er skilt rætt – at hann kundi hugsað sær, at yvirskotið var upp aftur størri. Hann vil óivað koma í søguna sum tann fíggjarmálaráðharrin, sum megnaði at spara hálvaaðru ella tvær milliardir saman. Peningur, sum helst skal í skiftisgrunnin í sambandi við fullveldisætlanina.

NÓGVIR føroyingar fegnast óivað saman við Karsten Hansen. Tað er eisini útmerkað at spara pening saman at hava á kistubotninum, um tíðirnar aftur versnað. Men í grundini sendir Karsten Hansen og landsstýrið føroyingum eina rokning, sum er hálva milliard krónur ov stór.

FÍGGJARLÓGIN er fyrst og fremst karmurin um tað almenna virksemið í Føroyum. Í fíggjarlógini verður staðfest, at tað kostar so og so nógv at reka samfelagið – skúlar, samskifti, heilsuverkið, almannaverkið o.s.fr. – og tá hetta er roknað út, skal Fíggjarmálastýrið krevja inn hesa upphæddina umvegis landsskatt, toll og avgjøld. Men landsstýrið sendir ikki føroyingum eina rokning fyri henda kostnaðin. Nei, landsstýrið sendir skattgjaldarunum eina rokning, sum er einar 400 milliónir krónur ov høg. Tá vit fáa eina ov stóra rokning frá einum persóni ella fyritøku fyri eina tænastu, kalla vit tað »okur«.

Í GRUNDINI er tað ikki sørt nasadjarvt at senda skattgjaldarunum eina alt ov stóra rokning. Vit fáa jú ikki nakra tænastu fyri hesar 500 milliónirnar. Tað er lætt at finna upp á ymiskt fyri at brúka peningin til, men tað er helst breið semja um, at vit skulu vera varin ikki at skrúva almenna blussið ov nógv upp.

HINVEGIN stendur eftir, at føroyski skattgjaldarin rindar alt ov nógv í skatti og avgjøldum. Tað kostar 40 milliónir krónur at lækka skattin eitt prosent. Við øðrum orðum kundi skatturin verið lækkaður nógv prosent, um Karsten Hansen bara skrivaði okkum rokningina fyri tað, sum tað kostar at reka føroyska samfelagið á verandi støði. – Hvussu leingi fer skattgjaldarin, sum hevur torført at fáa endarnar at røkka saman, at góðtaka henda skatta- og fíggjarpolitikkin?

Sosialurin

Viðmerkingar:

Svar

Formaðurin í Starvsmannafelagnum Gunnleivur Dalsgarð sigur í samrøðu við Sosialin tann 27. sept. 2000, at Starvsmannafelagið ikki hevur tikið limir frá Føroya Arbeiðarafelag.

Hetta er beinleiðis ósatt og hetta veit formaðurin í Starvsmannafelagnum, tí hann er vitandi um, at dagrøktarmammurnar í øllum kommunum uttan Klaksvík og Havnini, har Starvsmannafelagið hevur roynt at troka seg inn, eru limir í lokalfeløgum okkara.

Dagrøktarmammurnar eru tíverri ikki einasta dømi, tí Føroya Arbeiðarafelag hevur eisini víst á onnur konkret dømir, har Starvsmannafelagið hevur gjørt sáttmála sum umfataði limir hjá lokalfeløgum okkara, og einki av hesum dømum hevur Starvsmannafelagið víst aftur.

Tá formaðurin í Starvsmannafelagnum kemur við pástandi um, at dag-røktarmammurnar hava verið ein forsømdur bólkur, og at felag okkara hevur havt ríkiligt av tíð at fáa viðurskiftini hjá teimum í rættlag, so kann eg vísa á, at vit í longri tíð hava arbeitt við at fá aí lag sáttmála fyri dagrøktarmammurnar, og her hava dagrøktarmammurnar verið við, so okkara partur hevur ikki ligið eftir.

At pástanda, at Kommunala Starvsmannafelagið í Havn hevur æruna av, at rættlag er komið á viðurskiftini hjá dagrøktarmammunum er burtur úr vón og viti, tí Føroya Arbeiðarafelag er tað fyrsta felagið, sum hevur gjørt uppskot til og hevur fingið í lag sjálvstøðugan sáttmála sum bert er galdandi fyri dagrøktarmammurnar.

Kommunala Starvs- og Tænastumannafelagið í Havn hevur í sínum sáttmála bert nakrar fáar linjur um dagrøktarmammur, tí sáttmálin hjá hesum felag er gjørdur fyri skrivstovufólk, og tí verða reglurnar fyri onnur starvsfólk so sum dagrøktarmammur bert eitt uppískoyti, og tað kann sjálvsagt ikki vera nøktandi. Dagrøktarmammurnar í Havn vístu eisini fyri fáum árum sína misnøgd við reglurnar í sáttmálanum hjá nevnda felag.

Annars kann eg undirstrika at Kommunala Starvs- og Tænastumannafelagið í Havn hevur onki havt við sáttmála at gera uttanfyri Havnina, tí á øki Føroya Arbeiðarafelags hava teir ongantíð havt nakað at gera.

Starvsmannafelagið hevur heldur ikki gjørt nakran øðrvísi sáttmála enn tann, sum Kommunala Starvs- og Tænastumannafelagið hevði gjørt í Havnini, áðrenn Felagið fór uppí Starvsmannafelagið.

Tað sum vit í Føroya Arbeiðarafelag og lokalfeløgunum fílast á er, at Starvsmannafelagið aftan fyri ryggin á okkum er farin til kommunurnar, hóast tey vita at so at siga allar dagrøktarmammur hava arbeitt innan fyri sáttmálaøki okkara, og at hesar dagrøktarmammur framvegis eru limir í lokalfeløgum okkara.

At verja seg við, at tað eru ávísar kommunur, sum hava biðið um at fingið sáttmála, sum eisini er galdandi fyri dagrøktarmammur, er bert ein bílig umbering, tí vit hava kunnleika um hvussu Starvsmannafelagið er farið fram í sambandi við royndir teirra at fáa limir okkara við í sáttmála teirra. Um Starvsmannafelagið hevði havt viðing fyri fakmørkum okkara, so hevði felagið ikki farið inn á økið hjá øðrum fakfeløgum uttan mun til um arbeiðsgevaraparturin (í hesum føri kommunurnar) høvdu lagt upp til hetta ella ikki. Tað nyttar tí einki hjá Starvsmannafelagnum at royna at geva kommunum skyldina.

Eg haldi tað er nógv fyri, at formaðurin í Starvsmannafelagnum eisini vil leggja okkum til last, at vit ikki hava fingið í lag sáttmála fyri dagrøktarmammurnar fyrr enn nú, og at vit ikki gera nakað fyri hesar limir okkara.

Um vit skulu gera eina meting av hvør hevur tikið sær betur av limum sínum, so skulu vit ikki longur enn 7-8 ár aftur í tíðina, tá Starvsmannafelagið bakkaði fyri Fíggjarmálastýrinum og fyrst av øllum góðtók ein lønarniðurskurð, soleiðis at øll hini alment løntu vórðu tvingaði at góðtaka at lønin hjá limunum var sett niður við uml. 8%. Er hetta at taka sær av áhugamálunum hjá limunum?

So at Starvsmannafelagið setti spor eftir sær har, er einki ivamál um.

Her stóð Føroya Arbeiðarafelag, saman við hinum feløgunum á privata arbeiðsmarknaðinum fast, og vit tryggjaðu limum okkara at løn teirra ikki fór niður. Tað kostaði eisini nógv fyri feløgini á privata arbeiðsmarknaðinum at halda tørn, so lønin ikki fór niður.

Eg haldi at tað fyri fakfeløgini sum heild hevur sera stóran týdning, at feløgini virða tey fakmørk, sum vit hava havt so at siga síðani feløgini vóru sett á stovn.

Tað er tí ein vanlukka fyri fakfeløgini og limir teirra, at Starvsmannafelagið ikki vil virða hesi fakmørk, tí tað kann ikki annað enn skaða samstarvið millum feløgini, og tann sum fær fyrimun av tí er arbeiðsgevaraparturin. Eingin ivi er um, at hetta fer at fáa avleiðingar fyri samstarv okkara við Sjeymannabólkin, tí vit kunnu sjálvandi ikki hava samstarv við eitt felag sum fer aftan fyri ryggin á okkum og roynir at gera sáttmála sum umfatar limir okkara.

Eitt skulu Starvsmannafelagið og kommunurnar tó vita og tað er, at vit fara ikki at sita hendur í favn um limir okkara, beinmleiðis ella óbeinleiðis verða tvingaðir upp í Starvsmannafelagið, og tí fara vit at taka tey stig, sum neyðug eru fyri at forða fyri hesari gongdini.

Tórshavn,
hin 28. sept. 2000
Ingeborg Vinther

Lyktakanningin í oktober

Árliga lyktakanningin verður í døgunum 16. til og við 29. oktober. Eins og seinast verða latnir vinningar, áfyllingar av olju og bensini. Kanningin verður skipað á sama hátt sum í fjør, og nærri verður kunngjørt um hetta seinni.

Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

Blaðleiðslan

Ólóglig prutl í Havn

Í einstøkum skúlaflokkum í Havn eiga meira enn triðingur av næmingunum prutl. Næmingarnir ganga í einstøkum førum saman um at keypa fleiri sama slag „scootarar", og søgur ganga millum næmingarnir um, at onkur seljari „tunar" motorarnar fyri teir, so prutlini koyra yvir 90 km/t. Hetta er ólógligt, og gevur hækkandi bøtur fyri hvørja ferð, ein tílíkur verður tikin triðu ferð leggur løgreglan eisini hald á prutlið.

Løgreglan upplýsir, at tey hava hoyrt søgur um ólógligu viðgerðina av prutlunum, men eingin ákæra er enn reist móti nøkrum seljara fyri ólógligu „tuningina", tí løgreglan hevur einki stakt mál, har nakar stendur fram sum vitni.

Tørvandi nummarspjøldur Fólk, serliga í Havnini, finnast at, at tey illa fáa boðað frá ólógligari prutlkoyring, tí øll prutlini tykjast rættiliga eins, og eingi frámerki eru longur á prutlunum, so tey kennast ikki at. Spurt verður, hví prutlini ikki hava nummarspjøldur longur. Til tað er at siga, at tey spjøldrini, prutlini høvdu, vóru tryggingarspjøldur, latin av Tryggingarfelagi Føroya, og ikki av Bileftirlitinum. Síðani Tryggingarfelagið gavst at nýta hesi spjøldur hava prutlini eingi frámerki havt. Løgreglan upplýsir, at tað hevði verið ynskiligt við nummarspjøldrum.

Lønargjaldingar í vinnugreinum og %-broyting, 1989 – aug. 2000 í mió. kr.

Vinnugrein	Lønargjaldingar, í mió. kr. 1989	1995	1996	1997	1998	1999	Jan. – aug. 1999	Jan. – aug. 2000	Prosentbroyting Jan.-aug. '96-97	'97-98	'98-99	1999-2000
1 Landbúnaður	6	3	4	4	5	5	3	**4**	-1	23	18	**31**
2 Fiskiskapur	662	536	607	686	809	751	482	**517**	13	18	-7	**7**
3 Ali- og kryvjivirki	74	56	69	75	82	111	66	**76**	9	9	35	**15**
5 Ráevnisvinna	5	7	8	8	9	11	7	**8**	-5	17	21	**19**
6 Fiskavinnuidnaður	401	231	255	240	272	309	196	**224**	-8	13	14	**14**
7 Skipasmíðjur, smiðjur	97	74	82	82	88	93	59	**65**	-1	7	6	**10**
8 Idnaður annars	170	94	106	114	124	147	93	**111**	8	9	18	**19**
9a Alm.byggv.(landsv.frj	69	34	35	36	33	36	22	**26**	3	-7	7	**22**
9b Annað byggivirksemi	310	64	77	115	152	183	110	**142**	48	32	21	**28**
10 Orkuveitning	48	35	37	37	37	37	25	**26**	1	-1	2	**8**
11 Handil og umvæling	495	310	335	360	387	428	271	**296**	7	8	10	**9**
12 Gistirhús og matstovur	44	25	30	34	39	46	29	**35**	13	16	18	**18**
13 Sjóflutningur	155	129	136	134	144	165	107	**123**	-1	8	14	**15**
14 Flutningur annars	73	48	54	59	76	84	53	**63**	10	28	10	**19**
15 Postur og fjarskiti	125	100	105	111	120	126	83	**88**	6	8	5	**6**
16 Fígging og trygging	207	193	189	203	207	222	147	**159**	7	2	7	**9**
17 Vinnuligar tænastur	142	78	85	101	102	111	72	**83**	19	*	9	**15**
18 Húshaldstænastur	27	20	21	21	23	26	16	**19**	4	7	12	**18**
19 Almenn fyrisiting v.m.	572	509	548	584	626	668	434	**476**	6	7	7	**10**
20 Undirvising	238	203	210	216	226	238	155	**155**	3	5	5	**0**
21 Heilsu & almannaverk	455	413	435	461	481	523	347	**372**	6	4	9	**7**
22 Felagsskapir, meðtan	54	58	60	67	70	91	62	**53**	12	5	28	**-14**
23 Óloyslig vinna	3	1	4	18	28	23	14	**19**	*	*	*	*
1-23 Tilsamans	**4.432**	**3.221**	**3.491**	**3.766**	**4.138**	**4.435**	**2.851**	**3.142**	**6**	**10**	**7**	**10**
Í høvuðsbólkum:												
1- 8: Framleiðsluvinnur	1.415	1.002	1.131	1.209	1.388	1.428	906	**1.005**	7	15	3	**11**
9-18: Bygging, handil, flutn. o.a tænastur	1.695	1.095	1.102	1.210	1.320	1.464	934	**1.060**	10	9	11	**13**
19-22. Almennar tænastur o.t.	1.319	1.183	1.253	1.328	1.402	1.520	997	**1.056**	6	6	8	**6**

Tað verður alsamt meiri og meiri útgoldið í lønum í Føroyum. Ikki minst hevur framgongdin verið stór í framleiðsluvinnum av ymsum slag. Hinvegin hevur vøksturin í almennum tænastum ikki verið so høgur

Vit hava fingið 10% meiri í løn

Tað gongur enn framá hjá føroyingum. Bara átta teir fyrstu mánaðirnar í ár hava føroyingar fingið næstan líka nógv í løn sum alt 1995 tilsamans

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað gongur framvegis væl hjá føroyingum. Í hvussu so er um vit hugsa um pengar.

Tey feskastu tølini vísa, at átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, vóru lønargjaldingarnar í Føroyum 10% hægri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Nýggjasta yvirlitið frá Hagstovu Føroya vísir, at frá 1. januar til 31. august í ár fngu føroyingar 3.142 milliónir í lønum.

Átta teir fyrstu mánaðirnar í fjør fingu vit 2.851 milliónir í løn.

Her er talan um útgoldnar A inntøkur. Arbeiðsloysistuðul, almannaveitingar og annað, er ikki talt upp í.

Sostatt hava vit átta teir fyrstu mánaðirnar í ár forvunnið næstan líka nógv, sum vit gjørdu alt 1995, sum var ringasta kreppuárið, tá vóru lønargjaldingarnar í Føroyum 3.221 milliónir, ella bara 79 milliónir enn fyri átta teir fyrstu mánaðirnar í ár.

Taka vit so metárið 1989, vóru lønargjaldingarnar tað árið 4.432 milliónir.

Í høvuðsheitum kann sigast, at tað eru í framleiðsluvinnunum, at tann størsta framgongdin er, ímeðan tær almennu tænasturnar eru hækkaðar nógv minni.

Í tí, sum er framleiðsluvinnur burturav, fiskiskapur, fiskavirki, skipasmiðjur og ídnaður av alskyns slag, eru lønargjaldingarnar átta teir fyrstu mánaðirnar í ár hækkaðar 11%.

Í tí, sum kemur undir byggivinnuna, handil, flutning og ymsar tænastur, hevur vøksturin verið 13% átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti í fjør.

Hinvegin hevur vøksturin í almennum tænastum bara verið 6% hesa tíðina.

Sostatt sæst eisini, at í meðan vøksturin í almennum tænastum hevur ligið rættiliga støðugt í millum 6-8% tey seinastu fýra árini, hevur gongdin í framleiðsluvinnuni verið rættiliga skiftandi.

Frá 1997-1998 vuksu lønargjaldingarnar í framleiðsluvinnuni heili 15%, men frá 1998-1999 var vøksturin bara 3%. Síðani hevur vøksturin so aftur verið 11% átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti í fjør.

Í byggivinnuni, í handli og í tænastuvinnuni, hevur gongdin verið eitt sindur støðugari, har hevur vøksturin ligið ímillum 9 og 11%, men átta teir fyrstu átta mánaðirnar í ár var vøksturin 13% afturímóti tíðini frá januar til august í fjør.

Fiskimenn tjena mest

Tey nýggjastu tølini vísa, at ikki óvæntað kemur størsta íkastið til lønargjaldingarnar frá fiskimonnum.

Átta teir fyrstu mánaðirnar í ár fingu fiskimenn 517 milliónir í løn, afturímóti 482 milliónum í sama tíðarskeiði í fjør.

Næststørsti bólkurin er almenna fyrisitingin, sum betalti 476 milliónir í lønum átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti 434 milliónum í somu tíð í fjør.

Og Almanna- og heilsuverkið eigur triðja plássið við 372 milliónum í lønargjaldingum í januar til august í ár, afturímóti 347 milliónum í fjør.

Næststørsti bólkurin í privatu vinnuni er innan handil og gisting, har lønargjaldingarnar vóru 296 milliónir átta teir fyrstu mánaðirnar í ár, afturímóti 271 milliónum átta teir fyrstu mánaðirnar í fjør.

Men eisini í fiskivinnuni á landi, hevur talan verið um ein vøkstur, tí átta teir fyrstu mánaðirnar í ár vóru lønargjaldingarnar har 224 milliónir, aftur ímóti 196 milliónum í sama tíðarskeiði í fjør.

Ein góð ábending

Gongdin í lønargjaldingunum geva eina góða ábending um vøksturin í samfelagnum, tí lønargjaldingarnar verða mettar at verða umleið 65% av bruttotjóðarúrtøkuni.

Og í einum yvirliti, sum landsbankin hevur gjørt, sæst, at hesi seinastu árini hevur bruttotjóðarúrtøkan verið:

	1995	1996	1997	1998	1999
BTÚ	5.322	5.738	6.167	6.959	7.503
Realur vøkstur	4,9%	2,3%	5,4%	10,6%	5,0%

Tølini fyri BTÚ eru í milliónum krónum

Ongin ábending um prísbroyting á fiski

Næsta ár metir Fiskirannsóknarstovan, at vit fara at fiska 69.000 tons av toski, hýsu, upsa og kongafiski undir Føroyum

ÁKI BERTHOLDSEN

Fiskiskapurin hevur sera stóran týdning fyri búskaparligu gongdina og búskaparliga vøksturin í Føroyum.

Og, hvat fiskiskapi viðvíkur, er tað serliga fiskiskapurin eftir botnfiski undir Føroyum, sum hevur áhuga, tí júst hesi fiskasløgini eru týdningarmikil fyri framleiðsluna og virksemið á landi.

Í einum yvirliti, sum fylgir við uppskotinum til fíggjarlógina, sum varð lagt fyri tingið herfyri, metir Fiskirannsóknarstovan, at vit fara at fiska tilsamans 69.000 tons av toski, hýsu, upsa og kongafiski komandi ár.

Í ár verður fiskiskapurin av hesum fýra fiskasløgunum mett til 77.000 tons.

Í yvirlitinum hjá Fiskirannsóknarstovuni, standa tølini fyri fiskiskapin eftir hesum fýra botnfiskasløgunum hesi seinastu árini, umframt at metingar eru gjørdar fyri fiskiskapin í ár og næsta ár.

Sum tað sæst, er fiskiskapurin eftir toski minkaður tey seinastu árini og tað eru ongi útlit fyri, at gongdin fer at venda í bræði.

Hýsufiskiskapurin er rættiliga støðugur og upsafiskiskapurin veksur støðugt.

Eftir tilmælinum frá ICES, skal fiskiskapurin eftir toski ikki fara upp um 16.000 tons í 2001, fiskiskapurin eftir hýsu ikki upp um 22.000 tons og upsafiskiskapurin ikki upp um 17.000 tons.

Hinvegin hevur løgtingið ásett, at fiskidagatalið skal verða tað sama næsta ár, sum í ár. Men vit eiga ikki at vænta betri fiskiskap komandi ár.

Tað er heldur ikki væntandi, at okkara kvotur aðrastaðni verða nógv øðrvísi enn í ár, hóast stórar broytingar eru hendar viðvíkjandi teimum einstøku fiskasløgunum.

Eitt nú er botnfiskakvotan í Barentshavinum nógv skerd frá 1998 til í ár.

Sostatt er íkastið av fiskivinnuni til samfelagsbúskapin minkað seinastu árini.

Hinvegin er eftirspurningurin eftir fiski stórur.

Harafturat er prísurin høgur og framleiðsluvirðið høgt.

Umframt útboðið av fiski á heimsmarknaðinum, eru tað nógv onnur viðurskifti, sum kunnu ávirka prísin á fiskim, men í løtuni er onki, sum bendir á, at prísirnir fara at broytast stórvegis.

Eitt nú verður nógv gjørt uttanlands fyri at fáa fólk at eta meiri fisk.

Harafturat gera sjúkur í hønungum, neyta-og oksakjøti, o.ø. sítt til, at stimbra eftirspurningin eftir fiski.

Yvirlitið, sum fylgir við fíggjarlógini vísir eisini, at umframt skip, stavar nógv tann størsti parturin av vøkstrinum í útflutningunum frá laksi og síli, men eisini útflutningurin av saltfiski er nógv vaksin. Hinvegin er útflutningurin av frystum og ísaðum fiskaflaki minkaður eitt sindur. Útflutningurin av fiskavørum til ídnað er eisini minkaður nakað.

Hinvegin verður mett, at útflutningsvirðið av alivinnuni fer at verða 1,5 milliard longu í 2002. Í fjør var tað 880 milliónir. Sostatt fer alivinnan at standa fyri bróðurpartinum av føroyska útflutninginum um heilt fá ár.

	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001
Toskur	9	18	37	33	24	18	18	19
Hýsa	4	4	9	16	20	16	22	18
Upsi	29	24	17	19	23	29	31	26
Kongafiskur	9	8	7	7	6	6	6	6

Yvirlit yvir fiskiskapin eftir toski, hýsu, upsa og kongafiski tey seinastu árini, umframt metingarfyri í ár og næsta ár. Tølini eru í 1.000 tonsum